# órt mál





*Umborð á Másanum kundu umstøðurnar til ferðafólkini verið betri. Her fær Regin eitt prát við ein annan svínoying, sum var komin út at greiða atkvøðu. Hetta var uttan iva eisini dagsins mál í salongini á Másanum*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Másin hevur verið góður

**Tað eru uttan iva mong sum halda, at tað er ov seint at gera nakað við og fyri Svínoy. Hesum er Regin Justinussen kortini ikki fullkomuliga samdur í**

LIVILÍKINDI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Ein fortreyt fyri livilíkindum í bygdini er, at sambandið til og frá verður betrað munandi.

Svínoyingar eiga fleiri ídnar talsmenn. Hesir hava víst á fleiri loysnir, m.a. at gera eina nýggja havn og at útvega eitt annað skjótari og meiri nýmótans ferðamannaskip. Onnur hava tosað um at gera ein undirsjóvartunnil út higar.

Felags fyri hesar loysnirnar er ynskið um, at svínoyingum verður tilluttaðir sama atgongd til møguleikar og hentleikar á meginøkinum.

- Hetta er eitt ófrávíkiligt krav fyri at nøkur vón skal vera fyri bygdina. Møguleikin at ferðast við Másanum er ikki nóg góður til dagin í dag, sigur Regin.

## - Másin dugir ikki í dag

Í løtuni er tað Másin sum røkir siglingina av Hvannasundi til Svínoy og Fugloy.

Skipið er sjógott og røkir siglingina væl, men krøvini í 1959, tá tað var latið av Tórshavnar Skipasmiðju og í dag, eru jú ikki tey somu.

Regin er fegin um at hava sjóvegis samband, men sum hann tekur til: - Við einum skjótt 50 ára gomlum skipi, noy, tað dugir ikki í dag!

Eitt av mongu ynskjunum er, at túrarnir vórðu lagdir soleiðis, at fólk dagliga kundu ferðast millum heim og arbeiðspláss, eins og tey hava møguleika fyri á Kalsoynni.

- Tað er heilt sikkurt, at verður ikki okkurt gjørt fyri samferðsluna, so er eingin framtíð fyri bygdina.

- Sum er, er bygdin á markinum við bert 8 til 10 fólkum um veturin. So tú skilir, at her stendur ikki væl til, slær Regin fast.



*staðfest Regin Justinussen. Hann atkvøddi tí*

*Mynd: Høgni Thomsen*




*Ein avgerandi spurningur sum kravdi eitt avgerandi svar. Og tað gjørdist eisini úrslitið*

*Mynd: Høgni Thomsen*

## Eitt greitt JA til samanlegging

Ein stórur meiriluti av svínoyingum eru fyri samanlegging við Klaksvík

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni í dag vísti greitt tað sum mong helst mundu vænta: Eitt greitt ja.

Fólkaatkvøðan var millum klokkan 13 og 16, og tá upptalt varð, beint eftir at valhølið lat aftur, høvdu 27 fólk greitt atkvøðu. Av hesum vóru heili 24 fyri eini samanlegging.

Úrslitið vísti eisini, at tvær atkvøður vóru ímóti samanleggingini og ein atkvøða var blonk.

Íalt høvdu 44 fólk valrætt til fólkaatkvøðuna.